NSÍ–GÍ 1–1 (1–0):

# Ólavsøkan hongur í leysum lofti

**Undan seinnu oyggjauppgerðini er einki avgjørt, um tað verður GÍ ella NSÍ, sum skal vera annar parturin í finaluni**

LØGMANSSTEYPIÐ
*Jóannes Hansen*



*Við javnleiki í fyrra dystinum er enn púrasta opið, hvørt tað verða NSÍ ella GÍ, sum koma víðari til finaludystin*

Eysturoyggin fer at eiga eitt umboð í ólavsøkufinaluni. Um tað verður GÍ ella NSÍ verður ikki avgjørt fyrrenn sunnudagin. Undan tí dystinum er GÍ eitt vet betri fyri, men fyrimunurin er einki at tosa um. Um NSÍ annað árið á rað skal vinna seg í finaluna, so skulu teir gera mál í Sarpigerði næsta sunnudag. Um einki mál verður skorað sunnudagin, so verður tað GÍ, sum verður finaluliðið.

Dysturin í Runavík endaði 1–1. Um tað stendur á jøvnum eftir tveir dystir, so eru tað útivallarmálini, sum gera av, hvat liðið skal í finaluna, og GÍ tryggjaði sær sunnudagin eitt mál á tí kontoini.

### Popczynski høvuðsleikari

Gøtumenn vóru ikki komnir til Runavíkar fyri at hava ábyrgdina av leikliga undirhaldinum. Heilt eyðsýnt var tað, at teir sóu hesa uppgerðina sum 1. hálvleik í tveimum dystum, og teir lupu ongantíð framav.

Í 1. hálvleiki var Popczynski fremstur, og so var Magnus Skoralíð eitt vet aftanfyri, og í 2. hálvleiki var útgangsstøðan heilt greitt 4–5–1. Ungu menninir á miðvøllinum royndu at stríðast, og úrslitaliga komu teir væl burturúr tí. Men tað vóru álopsdygdirnar hjá spælandi venjaranum, sum tað varð dúvað mest uppá. Verjan royndi seg ofta við longum sendingum, og NSÍ verjan hevði av góðum grundum stóra virðing fyri Popczynski, sum tykist vera eins væl fyri nú, sum hann var, tá ið hann hevði ábyrgdina av FM liðnum hjá VB.

GÍ hevði fáar og smáar royndir á NSÍ málið. Í 1. hálvleiki var Jens Martin Knudsen í NSÍ málinum einu ferðina ikki heilt vísur í, um bólturin var farin í málið ella ikki, tá ið Popczynski hevði roynt seg við lumpisligum langskoti, og so var tað, í síðstu løtu, at Popczynski sjálvur fekk tiltuskað sær brotsspark, sum hann setti í netið.

### Megnaðu ikki at varðveita

NSÍ legði bragdliga fyri. Teir settu hol á beinanvegin, og tað kundi kanska havt boðað frá, at heimaliðið skuldi leggja unga mótstøðuliðið undir støðugt trýst og fáa tey málini, sum kundu havt við sær, at uppgerðin næsta sunnudag ikki hevði so stóran týdning. Men soleiðis gekst tað ikki.

Málinum bilti einki. Sonni L. Petersen snittaði við høvdinum langa sending framum verjuna, hann megnaði at renna eitt sindur úr høgru og frá mótstøðumonnunum, og tá ið hann var komin um brotsteigarmarkið eitt sindur til vinstru, langaði hann til við vinstra beini, og bólturin sang í netinum aftanfyri Jazek Przybylski.

Í 1. hálvleiki megnaði NSÍ onkra ferðina at spæla seg ígjøgnum í borðunum. Men í flestu førum var talan um langar sendingar fram til Petersen brøðurnar. Hjá teimum var tað torført, um teir ikki í fyrstu atløgu fingu tamarhald á, tí lotið bar við sær, at tað – hóast teir eru kvikir – ikki var lætt at renna bóltin uppaftur.

Sonni L. Petersen hevði gyltan møguleika undan steðginum at økja um heimaleiðsluna. GÍ kiksaði í uppspælinum, Helgi stakk bóltin fram til Sonna, sum gjørdist púra leysur. Hann setti ferð á, men tøvdi eitt lítið vet, tá ið hann skuldi leggja til, og so eydnaðist tað framúr skjóta Poul Andreas Jacobsen at tveita seg fram og takla.

Eftir steðgin hevði NSÍ lotið ímóti. Teir noyddust at skifta fólk, og teir megnaðu ikki at varðveita trýstið, sum kundi borið týdningarmikla 2–0 málið við sær. Jónstein Petersen, sum var væl upplagdur, hevði eina roynd, sum fór dygst omanfyri, og so var tað, at GÍ javnaði við brotssparki.

Hjá NSÍ líkist støðan nógv henni, tá ið teir í fjør spældu seg í finaluna. Ta ferðina var úrslitið 0–0 í Runavík, men so vann NSÍ á Svangaskarði. Nú eiga teir torføra grannauppgávu í Gøtu. Og hvørki GÍ ella NSÍ kunnu metast sum favorittar.

### Fyrrra hálvfinalan

**NSÍ–GÍ 1–1 (1–0)**
1–0: Sonni L. Petersen
1–1: Krzystof Popczynski br
Dómari: Oddmar Andreassen

**NSÍ:** Jens Martin Knudsen – Brynjolvur Nielsen, Messias Perreira, Sjúrður Jacobsen – Gert Langgaard, Kári Hansen, Ian Højgaard, Jónstein Petersen – Sonni L. Petersen, Helgi L. Petersen
**GÍ:** Jazek Przybylski – Poul Andreas Jacobsen, Bartal Eliasen, Leivur Hansen, Bárður á Lakjuni – Jónreid Dalheim, Høgni Madsen, Símun Samuelsen, Símun Louis Jacobsen – Krzystof I (Popczynski, Magnus Skoralíð

# Mintust Sofus í Runavík

NSÍ spælararnir høvdu svørt syrgibind um armin, tá ið teir sunnudagin spældu hálvfinalu á heimavølli ímóti GÍ, og tað var tøgn við Løkin fyrsta minuttin, eftir at dómarin hevði bríkslað fyrstu ferð.

Felagið, spælararnir og áskoðararnir mintust Sofus Hansen, sum doyði næstsíðsta mánadag bara 49 ára gamal. Sofus var við, tá ið NSÍ fyrstu ferð kom uppí fótbóltin. Hann var málverji í 2. deild og eisini, tá ið liðið í 1976 fyri fyrstu ferð royndi seg í 1. deild.

Fótbóltsvøllurin í Runavík varð tikin í nýstlu í 1972. Fyri ta tíð snúði tað mesta í NSÍ – umframt kappróðurin – seg um hondbólt, og har var Sofus eisini við.

Sofus lærdi til maskinsmið hjá Mekanik í Runavík, og so leyk hann maskinistprógv í Havnini.

Hann sigldi bæði á fjarleiðum og undir Føroyum, hann var maskinmaður á Bakka, hann hevði fleiri onnur størv, og hesa síðstu tíðina var hann hjá FJM í Runavík.

Sofus var sonur Karl Johan, sum var ættaður av Kinn í Lamba, og Jóhonnu, sum var av Toftum. Sofus var giftur við Klaru, sum er av Skipanesi. Tey búðu á Glyvrum. Børnini eru Kári, sum var á NSÍ miðvøllinum sunnudagin, Mortan, Jóhanna og Kartin.

**- jh**

# GÍ ætlar sær at vinna FM

**Formaðurin heldur, at venjarin vísir gott hegni at leggja lunnar undir nýtt lið, sum eigur at hava góðar møguleikar at standa seg næstu árini**

ÆTTARLIÐSSKIFTI
*Jóannes Hansen*

Vit arbeiða við at mynda nýtt FM lið. Tað er GÍ formaðurin, Jógvan Gregersen, sum vit hava á tráðnum. Hóast liðið hjá honum sunnudagin telvaði seg í góða støðu at røkka steypafinaluni, so heldur hann ikki, at tað kann roknast við, at GÍ fer at vinna FM í ár.

– Liðið er evnaríkt, men talan er fyri tað mesta um blaðungar spælarar. Við at spæla við í týdningarmiklum dystum fáa teir royndirnar, sum eru partur í menningini, og tað rokna vit við fer at síggjast aftur komandi árini, er vónin hjá Jógvani Gregersen.

Fleiri av royndu spælarunum hjá GÍ vóru ikki við í Runavík. Gidek hevur trupulleikar við lærinum, og Súni Olsen hevur trupulleikar við knænum. Men GÍ formaðurin roknar við, at teir báðir vera tøkir, tá ið KÍ hóskvøldið kemur til Gøtu at spæla fyrsta landskappingardystin á árinum. Tá verður Hans Pauli Petersen, sum var leikbannaður hesa ferð, eisini tøkur, og so vóna teir í GÍ, at Poul Ennigarð, sum hevur verið skaddur í meiri enn ein mánað, verður tøkur hósdagin.

### Unga liðið

Sunnudagin vóru fýra unglingaspælarar ímillum teir fyrstu ellivu hjá GÍ: Magnus Skoralíð, Høgni Madsen, Símun Louis Jacobsen og Símun Samuelsen, og tveir afturat – Kaj Ennigarð og Hanus Jacobsen –komu á vøllin síðstu løtuna, tá ið tíðin skuldi dragast út fyri at varðveita javnleikin.

– Popczynski hevur 24 spælarar at taka av. Tíggju av teimum eru unglingaspælarar, og venjarin vísir ungu monnunum álit. Um tað er ein spælari, sum ikki venur trý tey fyrstu kvøldini í vikuni, tí hann er skaddur, so smæðist venjarin ikki at taka ein ungan mann framum. Tað hevur góða ávirkan við sær, tí harvið síggja ungu menninir, at tað verður roknað við teimum, heldur GÍ formaðurin.

Av teimum tíggju unglingaspælarunum eru tað tveir, sum higartil í ár ikki hava verið á vøllinum. Teir eru Bjarni Justinussen, sum er sonur gamla stórspælaran hjá GÍ, Símun Petur Justinussen, og Páll Rói Poulsen.

At GÍ eigur nógvar ungar og evnaríkar fótbóltsspælarar, sæst aftur á avrikunum í unglingadeildini. Har hevur liðið spælt seg í finaluna ímóti EB/Streymi. Finalan verður spæld mikudagin 18. juni. Í hálvfinaluni vann GÍ samanlagt 8–4 á NSÍ. Hvussu tað verður í bestu deildini millum hesi bæði feløgini fæst at síggja sunnudagin.



# Runavík er stóri taparin í kappróðrinum

**Næststørsta kappróðrarfelagið í landinum fekk ikki eykaaðalfundin leygardagin at taka undir við, at FM stevna skal vera á eystara armi á Skálafjørðinum á hvørjum ári**

FM KAPPRÓÐUR
*Jóannes Hansen*



*– Nú vendist ikki aftur. FM kappróður verður á vestara armi á Skálafjørðinum í ár og í Vestmanna næsta ár. Tað er samtykt ikki minni enn tvær ferðir av aðalfundinum hjá RSF*

Lagið er einki serligt í Kappróðrarfelagnum NSÍ. Teir hava arbeitt við og vónað, at hini feløgini fóru at taka undir við, at FM kappróður skal vera á hvørjum ári á Eystanstevnuni. Tað vildi aðalfundurin í Róðrarsambandinum, sum varð hildin 29. mars, ikki taka undir við. Og leygardagin staðfesti eykaaðalfundur, har spurningurin um sjeyndu FM stevnuna var tann einasti á skránni, avgerðina, sum varð tikin síðst í mars. Tað vil við øðrum orðum siga, at Skála/-Strendur og Vestmanna skulu skiftast um sjeynda FM kappróðurin, og at tær tríggjar bygdirnar í Vágum skulu skiftast um Vestanstevnuna.

Harvið er støðan hjá Runavík verri, enn hon var, áðrenn teir í Kappróðrarfelagnum NSÍ av fyrstan tíð komu við uppskotinum um sjeyndu FM stevnuna. Higartil hevur FM kappróður verið annað hvørt ár í Runavík, og hitt árið hevur verið skipað fyri stevnu uttan FM kappróður. Tað ber sjálvandi framvegis til, men nú er støðan tann, at tann dagin, tá ið Eystanstevnan higartil hevur verið hildin, verður FM kappróður hinumegin fjørðin! Hetta er sjálvandi beiskur biti at svølgja hjá Kappróðrarfelagnum NSÍ, sum – burtursæð frá Havnar Róðrarfelag – man vera tað størsta og mest virkna í landinum. Men tað er fólkaræðið innan kappróðurin, sum hevur tikið avgerðina um, hvussu FM kappingin í kappróðri skal skipast, og harvið verður tað.

### Ikki til at rokna út

Tað var Kappróðrarfelagið NSÍ, sum hevði tikið stig til eykaaðalfundin, sum var fyrrapartin leygardagin. Ásetingarnar siga, at um meiri enn helmingurin av feløgunum ynskja tað, so skal Róðrarsambandið kalla inn til eykaaðalfund. Kappróðrarfelagið NSÍ hevði fingið seytjan av teimum um tríati feløgunum at skriva undir uppá, at tey vildu hava eykaaðalfund.

Á fundinum leygardagin møttu nítjan limafeløg. Nevndin í Róðrarsambandinum hevði tvær atkvøður. Talan var um skrivliga atkvøðugreiðslu, og tíggju vóru fyri uppskotinum at FM stevna á hvørjum ári skuldi vera í Runavík, og at ein FM kapping annað hvørt ár skuldi vera í Vestmanna og annað hvørt ár í Fuglafirði. Ellivu vóru ímóti hesum uppskoftinum. Ásetingarnar siga, at um tað hevði staðið á jøvnum, so hevði atkvøðan hjá RSF verið avgerandi.

Undan atkvøðugreiðsluni var orðaskifti í ein stívan tíma. Orðaskiftið snúði seg millum annað um, hvussu tað skuldi vera við fulltrúum. Kappróðrarfelagið NSÍ hevði fulltrú frá tveimum feløgum við á fund, men teir fingu ikki loyvi at nýta tær. Nevndin í RSF vísti til ásetingarnar og ÍSF siðvenju, og so taldu fulltrúirnar ikki við. Á fundinum síðst í mars varð atkvøtt við at rætta hondina upp. Hesa ferð var atkvøðugreiðlsan skrivlig.

– Atkvøðugreiðslan vísti, at tað ikki er samband millum, at feløgini tóku undir við eykaaðalfundinum og tí, sum tey atkvøddu á fundinum, staðfestir Hannis Joensen, formaður í RSF. Hann veit at siga, at tað ikki akkurát vóru somu feløgini, sum møttu hesa ferð, og sum møttu á aðalfundinum fyri hálvum øðrum mánað síðani.

### Av fyri hesa ferð

Formaðurin í RSF sigur, at aftur hesa ferð vildi nevndin ikki leggja seg út í, um FM róðurin skuldi vera her ella har.

– Leikluturin hjá okkum var at syrgja fyri, at uppskotið, sum var til atkvøðugreiðslu, var sambært ásetingarnar hjá RSF. Uppskotið hjá Kappróðrarfelagnum NSÍ gekk út uppá, at FM kappróður skuldi vera á Eystanstevnu fjúrtan dagar eftir Norðoyarstevnu, og at FM kappróður skuldi vera fyrsta vikuskifti í juli annað hvørt ár í Fuglafirði og í Vestmanna. Hetta hevði verið í andsøgn til grein tvey, sum sigur, at feløgini boða frá, nær teirra stevnur eru, og at RSF ásetur nær kappingarnar skulu vera, um ósemja er millum feløgini. Tí settu vit broytingaruppskot fram, sum var í samsvari við tað hjá NSÍ, men sum var øðrvísi orðað. Tað var hetta uppskotið, sum var til atkvøðugreiðslu, men sum fall.

*Hvussu verður nú?*

– Nú vendist ikki aftur. FM kappróður verður á vestara armi á Skálafjørðinum í ár og í Vestmanna næsta ár. Samtyktin, sum nú er gjørd tvær ferðir, verður galdandi, inntil tað á aðalfundi møguliga verður samtykt okkurt annað, sigur RSF formaðurin.

Tær sjey FM kappingarnar í kappróðri í ár vera hesar: Norðoyarstevna 31. mai, á Skála/Strondum 14. juni, á Kollafirði 21. juni, á Jóansøku 29. juni, á Varmakeldu 5. juli, á Vestanstevnu í Sandavági 12. juli og á Ólavsøku 28. juli.

# Balling og Nygaard á talvuna

**Vejle, Hvidovre og B93, sum hevur Anders Nygaard á liðnum, taptu hesa ferð, og Christian Høgni slapp upp í part síðstu løtuna**

DANMARK 1. DEILD
*Jóannes Hansen*

Heldur ikki í næstbestu donsku deildini høvdu undanvind í vikuskiftinum. Óli Johannesen og Hvidovre høvdu vitjan av Randers Freja, sum hevur Atla Gregersen í hópinum. Hóast Hvidovre var á odda í steðginum, so fóru gestirnir við øllum stigunum. Teir vunnu 3–1, og nú stendur á gomlum nøglum í Hvidovre, sum er næstniðast og tykist hava kós ímóti niðurflytingini.

Dreymurin hjá Vejle eftir eitt ára fráveru aftur at sleppa upp í part í bestu deildini kámaðist nógv í vikuskiftinum. Fyrrapartin sunnudagin var Vejle og vitjaði í Herfølge, og nú skal vilja meiri enn illa til, um gamla meistaraliðið ikki eftir summarsteðginum verður partur av superliguni. Talan var um rættuliga undirhaldandi uppgerð, sum Herfølge vann 5–2. Heimaliðið var á odda 2–0, tá ið tíggju minuttir vóru farnir, og tá ið dysturin var seytjan minuttir gamal, var støðan 2–2. Seinna Vejle málið skoraði fyrrverandi NSÍ spælarin, Ulrik Balling, við hendinga góðum fluktskoti við vinstra beini.

Eftir steðgin setti Herfølge alt upp á pláss. Teir skoraðu trý mál afturat og vunnu 5–2. Vejle var undan dystinum og er framvegis á triðja plássi. Men munurin frá Herfølge og niður til næstu hóttanirnar niðanfyri uppflytingarstrikuna øktist, og harvið skal vilja meiri enn illa til, um Herfølge ikki eftir summarsteðginum verður í superliguni.

Christian Høgni Jacobsen var á beinkinum hjá Vejle. Hann varð skiftur inn, tá ið tað restaðu tjúgu minuttir. Christian Høgni loysti Ulrik Balling av í álopinum, men hann fekk einki mál. Ta løtuna, sum hann var á vøllinum, var heimaliðið greitt omaná. Undan hesum dystinum hevði Vejle vunnið seks ferðir á rað. Hetta var fyrsta tapið hjá Vejle, síðani teir fyrr í vár skiftu venjara.

Tapið hjá Vejle hevði við sær, at Frem kundi styrkja um sín møguleika at flyta upp, og tað eydnaðist. Frem var á útivølli í Fredericia, har teir vunnu 2–0, og nú eru teir seks stig frammanfyri Vejle.

Eitt av liðunum, sum saman við Hvidovre ríður um niðurflytingar strikuna, er B93. Gamla stórfelagið á Eysturbrúgv hevði vitjan av B1909 úr Odense, sum vann sannførandi 3–1. Troystarmálið hjá B93 kom ikki fyrrenn í evstu løtu. Tað skoraði Anders Nygaard. Í fjør taldist hann millum spælararnar hjá B68. Hann var málsøkin stuðul í steypakappingini og í fyrstu umførunum í landskappingini, men eftir at hann tíðliga í kappingini varð skaddur, hevði hann sera ilt við at koma fyri seg aftur.

AC Horsens, sum hevur Johan B. Hansen á linum, hevði vitjan av HIK, sum er aftast í deildini. Horsens vann 4–2.